Atløgupláss til nýggja Smyril í Havn:

# Ongin gongd í málinum



*–Vit hava ikki enn fingið at vita, hvat tann ítøkiligi trupulleikin er, so at vit ikki kunnu sleppa at gera atløgupláss til Smyril á Bursatanga. Sostatt fáa vit heldur ikki greiði á, um tað ber til at laga verkætlanina til, fyri at ganga friðingarmyndugleikunum á møti, sigur Havnameistarin í Havn*

## Arbeiðið at útvega nýggja Smyrli fast atløgupláss í Havn, liggur mestsum stilt í løtuni

SUÐUROYAR-SIGLINGIN

*Áki Bertholdsen, aki@sosialurin.fo*

Arbeiðið at útvega nýggja Smyrli fast atløgupláss í Havnini, liggur mestsum stilt í løtuni.

Síðani spurningurin um at økisfriða Tinganes tók seg upp, er mestum onki hent í málinum og enn er óvist, hvat yviurhøvur fer at henda.

–Eg dugi ikki at síggja, at útlit eru fyri nakrari loysn yvirhøvur, soleiðis sum málið nú liggur, sigur Jónsvein Lamhauge, havnarmeistari í Havn .

Hann sigur, at Tórshavnar Kommuna hevur gjørt eitt stórt arbeiðið fyri at útvega nýggja Smyrli fast atløgupláss í Havn.

Og loysnin, sum Tórshavnar Kommuna hevur víst á, er at gera pláss til Smyril inni á Bursatanga, uttaná atløguplássinum hjá Norrønu.

Men ein fortreyt fyri tí er, at tað verður dýpt framvið Tinganesi.

Mong eru ikki fegin um hesa loysnina og ta endaði við, at Fornminnamyndugleikarnir tóku stig til at økisfriða Tinganes út á 10 metra dýpi.

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, hevur enn ikki tikið støðu til friðingina, men hann hevur fyrr sagt fyri Sosialinum, at alt bendir á, at hann fer at fylgja tilmælinum og at friða økið.

### Saknar sakligar grundgevingar

Tað eru eisini nógv, sum halda, at tað ber ikki til at gera atløgupláss til tvey so stór skip inni á Bursatanga.

Men Jónsvein Lamhauge saknar sakligar grundgevingar fyri, hví tað ikki ber til.

Hann vísir á, at tað er roynt í simulatori í Danmark, saman við skiparunum á Smyrli.

– Og tað vísir seg, at tað ber væl til hjá Smyrli at leggja at inni á Bursatanga í vindi upp til 18 metrar um sekundið, beint inn á síðuna.

Havnameistarin saknar eisini, at fyrimunir og vansar verða vigaðir upp ímoti hvørjum øðrum.

–Tað er nakrar heilt fáar ferðir um vikuna, at Norrøna og Smyril eru í Havn í senn. Eftir galdandi summar ferðaætlan er tað tríggjar ferðir at bæði skipini eru í Havn í senn. Allar hinar ferðirnar kann Smyril brúka atløguplássið hjá Norrønu.

Tað hevur eisini verið víst á, at ein trupulleiki er, at Norrøna ikki sleppur at, tá ið Smyril liggur.

– Men sum ferðaætlanin er nú, er tað ongin trupulleiki, tí tað er hvørja ferð Smyril sum kemur, ímeðan Norrøna liggur og ikki øvugt.

Harafturat kemur Smyril ikki at liggja serliga leingi í Havn ísenn.

– Og skuldi tað hent, at Norrøna er seinkað, er Smyril eitt skip, sum er ógvuliga gott at manøvrera við og tað hevði verið skjótt hjá honum at flutt seg eina løtu at givið pláss fyri Norrønu.

– Men um Smyril flytir seg eina løtu, ímeðan hann liggur í Havn, nervar ikki ferðafólkið,tí tá er skipið tómt.

### Fáa onki svar

Havnameistarin saknar eisini at fáa í lag eitt samskiftið mentamálaráðið, um, hví ein ferjulega á Bursatanga, heilt ítøkiliga er eitt friðingarmál.

– Vit hava roynt at fáa eitt samskifti í lag við Mentamálaráðið um, hvat tann ítøkiligi trupulleikin er - um tað er ætlaða landgongdin, sum er ov høgt, um teir stúra fyri, at spreingingar fara at skala bygningarnar á Tinganesi, ella, hvat trupulleikin er, sum ger, at hildið verður, at Tinganes skal økisfriðast.

– Men í tí sambandi hava vit onki hoyrt aftur úr Mentamálaráðnum.

– Sostatt vita vit heldur ikki um tað ber til at gera onkrar tillagingar í verkætlanini, fyri at friðingarmyndugleikarnir kunnu geva okkum loyvi til at fremja hana

Jónsvein Lamhauge vísir samstundis á, at Tórshavnar Kommuna arbeiðir ikki við øðrum ætlanum fyri at útvega nýggja Smyrli atløgupláss í Havn.

– Tað eru ongar aðrar ætlanir um at byggja út í Tórshavnar Havn, sigur Havnameistarin.

Samstundis vísur hann á, at eftir øllum ábendingum úr Mentamálaráðnum, fær Tórshavnar Kommuna ikki loyvi at gera atløgupláss til nýggja Smyril inni á Bursatanga.

So nú tað ikki eru meiri enn fimm mánaðir eftir, til nýggi Smyril kemur, er tað sostatt framvegis líka óvist, hvar hann fær atløgupláss, sum tað altíð hevur verið.

Onkur hevur eisini nevnt, at gera pláss fyri nýggja Smyrli inni í krókinum við Skipafelagið.

Men eisini tað fer at skapa trupulleikar, tí tað er ivingarsamt um nýggi Smyril grynnur har.

Dýpið inni í krókinum við Skipafelagið er 5,80 metrar á fjørðu, og nýggi Smyril er settur at stinga 5,60 metrar, so tað er í øllum førum ikki nógv at geva av.

## Tað er best at SEV sjálvt eigur vindmyllurnar

**Vindmyllurnar órógva elnetið hjá SEV og tí er tað best, at tað er SEV sjálvt, sum eigur tær, sigur SEV**

VINDMYLLUR

*Áki Bertholdsen, aki@sosialurin.fo*

Tað er best, at SEV sjálvt eigur vindmyllurnar, sum skulu setast upp afturat.

Tað heldur Elfelagið og tí fer SEV ikki at gera fleiri sáttmálar við privatar um at seta vindmyllur upp.

Í tíðindaskrivi sigur stýrið fyri SEV, at tað ætlar at seta tríggjar vindmyllur upp í Neshaga. Men Vinnumálaráðið hevur biðið SEV um at bíða við at seta fleiri vindmyllur upp, til ein elorku lóggáva er gjørd.

Men tað ber ikki til hjá SEV

– Her er talan um eitt lið í einari royndarætlan og ætlanin er komin so væl áleiðis, at avtala er gjørd við vindmylluseljaran.

SEV sigur, at fyrsta stigið í hesi royndarætlan var sáttmálin við Røkt í Vestmanna um tríggar myllur á 660 KW.

– Hesar tríggjar myllurnar hava órógvað netið hjá SEV, og í fyrsta lagi hevur verið neyðugt at umleggja rakstrarmynstrið á elverkunum, fyri at avmarka órógvið.

Næsta stigið í royndarætlanini er, at SEV er at seta hesar tríggjar myllurnar upp í Neshaganum, sum „elektriskt" verða knýttar í samliskinnaran á Sundsverkinum, t.v.s. nakað burtur frá íbindingini í Vestmanna.

– Eisini hesar myllurnar fara at órógva elnetið, men vit vóna at kunna tillaga elframleiðslu okkara soleiðis, at hettar verður til at liva við, sigur SEV.

Lagt verður tó afturat, at svarið upp á hettar fæst ikki neyvt, fyrr enn royndirnar eru gjørdar.

– Um hettar næsta stigið í royndunum vísir seg at geva so stórar trupulleikar, at neyðugt verður at kopla eina ella fleiri av myllunum av netinum í styttri ella longri tíðarskeið, er best at SEV sjálvt eigur myllurnar, sigur felagið.

Annars sigur SEV, at tað hevur stóran áhuga í einum samstarvi um eina erlorkulóg, og at SEV er til reiðar at luttaka í hesum samstarvi við tí sakkunleika, sum SEV hevur. Samstundis kann SEV vera til hjálpar at fáa til vega uttanhýsis sakkunnleika á hesum øki, sigur SEV í einum tíðindaskrivi.



# Shell finst hvassliga at Kappingarráðnum




*Føroya Shell finst hvassliga at frágreiðingini hjá Kappingarráðnum um oljumarknaðinum í Føroyum. Kortini valdi Føroya Shell at lækka prísirnar á bensini og diesel mánadagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Vantandi fyrivarni fyri føroyskum viðurskiftum og skeivar samanberingar eru millum skoðsmálini, sum frágreiðingin hjá Kappingarráðnum um oljumarknaðin í Føroyum fær frá Føroya Shell. Kappingarráðið vísir ákærunum aftur**

OLJUMARKNAÐURIN Í FØROYUM

*Páll Holm Johannesen, pall@sosialurin.fo*

Á Føroya Shell eru tey alt annað enn samd við frágreiðingina hjá Kappingarráðnum um oljumarknaðin í Føroyum.

Stjórin á Føroya Shell, Hákun Djurhuus finst hvassliga at fleiri niðurstøðum í frágreiðingini. Hann heldur, at frágreiðingin byggir á skeivar samanberingar og Kappingarráðið hevur ikki tikið neyðugu fyrivarnini fyri føroyskum viðurskiftum.

Terji Sigurðsson, sum er ráðgevi á Kappingarráðnum, vísir atfinningunum aftur.

### Serliga marknaðartreytir

Stjórin á Føroya Shell, Hákun Djurhuus, vísir, í skrivi til Kappingarráðið, á, at føroyski oljumarknaðurin hevur bert tveir veitarar, og tað setir sín dám á kappingina millum Føroya Shell og Statoil Føroyar .

Í skrivinum til Kappingarráðnum stendur, at vørurnar bensin, diesel og fýringsolja eru sonevndar einaháttaðar vørur. Tað merkir, at góðskan á vørunum er tann sama, antin brúkarin keypir vøruna frá Føroya Shell ella Statoil Føroyar.

-Tá talan er um ein marknað við tveimum veitarum, har einsháttaðar vørur verða seldar, ber tað sjálvandi við sær, at prísirnir á vørunum eru teir somu á marknaðinum. Hetta sæst eisini innan onnur øki sum t.d. flogferðlsu og bankarentur, stendur millum annað í skrivinum.

Á Føroya Shell eru tey tí grundleggjandi ósamd við metingina hjá Kappingarráðnum um, at oljufeløgini avmarka kappingina við at samskipa framferðina, tí serligu føroysku marknaðartreytirnar gera, at prísirnir eru teir somu-og ikki ein samskipað framferð millum Føroya Shell og Statoil Føroyar.

### Skeivar samanberingar

Føroya Shell fýlist eisini á talgrundarlagið í frágreiðingini hjá Kappingarráðnum. Í frágreiðingin verða prísirnir á bensin og diesel samanbornir við ymisk lond, sum eru skrásett hjá einum felagið, ið kallar seg Oil Bulletin.

Á Føroya Shell verður mett, at prísirnir hjá Oil Bulletin geva eitt skeivt grundarlag.

Hákun Djurhuus er sannførdur um, at høvdu prísirnir hjá International Energy Agency(IEA) verið nýttir sum samanberingargrundarlag, høvdu samanberingarnar verið meira álítandi.

-Hevði Kappingarráðið nýtt IEA prísir, hevði úrslitið í frágreiðingini verið munandi øðrvísi. Svensku, norsku og donsku prísirnir høvdu verið hægri og munurin á prísunum í hesum londum og prísunum í Føroyum hevði harvið verið minni, verður sagt í skrivinum til Kappingarráðið.

Føroya Shell heldur eisini, at spurningur kann setast við um lítli føroyski oljumarknaðurin við sínum sereyðkenni sum ein fjarskotin oyggjabólkur kann sammetast við størru marknaðirnar í eitt nú Svøríki, Noregi og Danmark.

### Vísir atfinningum aftur

Terje Sigurðsson er ráðgevari í Kappingarráðnum, og hann vísir atfinningunum hjá Føroya Shell aftur.

-Eg er samdur við Føroya Shell, at tað eru nøkur atlit sum mugu takast, tá vit velja at nýta dátutilfar hjá Oil Bulletin. Sjálvsagt hava vit tikið tey neyðugu atlitini í samband við dátutilfari, tí sjálvandi er tað okkara fremsta mál at hava so álítandi tøl sum gjørligt, greiðir Terje Sigurðsson frá.

Hann leggur afturat, at Kappingarráðið hevur nýtt fleiri ymiskar stovnar til at savna neyðuga dátutilfarið, so frágreiðingin varð so álítandi sum gjørligt.

Terje Sigurðsson er ikki samdur í uppáhaldinum hjá Føroya Shell um, at tað einans eru serligu marknaðartreytirnar í Føroyum sum gera, at prísirnir eru teir somu hjá bæði Shell og Statoil

-Eg veit fullvæl, at á einum lítlum marknaði sum tí føroyska, har tveir veitarar selju somu vøru við somu góðsku, enda við at bjóða kundunum sama prís. Trupulleikin við í hesum føri er, at prísurinstøðið er ov høgt í Føroyum sammett við okkara grannalond, og tí tala vit at, sigur Terje Sigurðsson at enda.

Niðurstøðan í frágreiðingini hjá Kappingarráðnum er eisini greið. Føroya Shell og Statoil Føroya hava havt ov høgar prísir seinastu árini. Bæði oljufeløgini hava tikið niðurstøðuna til eftirtektar, og mánadagin vórðu prísirnar á bensin og diesel lækkaðir.

## Bensin- og diesel prísurin lækkar

**Bæði P/F Statoil Føroyar og P/F Føroya Shell hava lækkað prísirnar á bensin og olju. Príslækkingin er 0,40 kr. liturin og 0,15 kr. liturin fyri ávikavist bensin og diesel**

LÆKKING

*Páll Holm Johannesen, pall@sosialurin.fo*

Mánadagin gjørdu bæði oljufeløgini, P/F Statoil Føroyar og P/F Føroya Shell, av at lækka bensin- og olju prísirnar. Príslækkingin hevur við sær, at brúkarin fer at rinda 0,40 kr. liturin og 0,15 kr. liturin minni fyri ávikavist bensin og diesel í framtíðini

Kappingarráðið hevur síðan 1999 kannað føroyska oljumarknaðin, og er komið eftir, at prísirnir á bensini og diesel eru hægri í Føroyum enn í grannalondunum, tá hædd verður tikin fyri almennum avgjøldum.

Við støði í frágreiðingini hevur Kappingarráðnum síðan februar mánað verið í samráðingum við P/F Statoil Føroyar. Ætlanin var eisini at umrøða ov høgu prísirnar við hitt stóra oljufelagið í Føroyum, P/F Føroya Shell, men Shell avvísti at samráðast.

### Stór sparing

Eftir fleiri samráðingarumfør funnu Kappingarráðið og P/F Statoil fram til eina semju. Úrslitið av samráðingunum varð, at P/F Statoil lækkar bruttovinningin á bensini og diesel til endabrúkaran við ávikavist 0,32 kr. liturin og 0,12 kr.liturin uttan MVG.

Á heimasíðuni hjá Kappingarráðnum verður sagt, at brúkarin fer at merkja príslækkingina sum ávikavist 0,40 kr. liturin og 0,15 kr. liturin.

Avtalan millum P/F Statoil Føroyar og Kappingarráðið er galdandi eitt ár.

### Færri støðir

Í Sjónvarpi Føroya mánakvøldið greiddi stjórin á P/F Statoil Føroyar, Niels Juul Nattestad, at príslækkingin fer at hava við sær, at færri Statoil-støðir verða kring landið. Hann kundi kortini ikki siga ítøkiliga hvussu nógvar støðir fara noyddar at lata aftur.